Jógvan Sundstein: Broytingar í umsitingini kunnu enda við kaos

Tað er óforsvarligt at seta seks aðalstjórar í nýggju landsumsitingina nú, tí ongin hevur enn definerað, hvussu tey seks stýrini skulu virka. Verða stjórarnir settir, enda teir størvum, har teir ikki vita, hvat teir skulu gera, og landsstýrismenninir, sum verða ráðharrar á ólavsøku, fáa tað trupult, tí ógreitt verður, hvat teir fáa ábyrgd av. Í ringasta føri enda bygnaðarbroytingarnar við umsitingarligum kaos, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður.

UNI ARGE

Verða broytingarnar í landsumsititingini gjøgnumførdar eftir tí leisti, sum Finn Normann Christensen hevur skorið, kann væl vera, at umsitingarligt kaos fer at valda eftir ólavsøku.

Analyserandi arbeiðið, sum forstjórin í Tinganesi skuldi gera, hevur ikki verið nóg gott. Greitt er ikki definerað, hvussu ymsu stýrini skulu virka, og tí hevur tað lítla meining at seta teir seks aðalstjórarnar longu nú.

Hetta sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður og landsstýrismaður í viðmerking til uppskotið um nýggja landsumsiting, sum Finn Norman Christensen herfyri læt landsstýrinum.

Jógvan Sundstein hevur sett seg inn í tilfarið hjá Finn Norman Christensen og fýlist á, at lítið stendur um, hvussu ymsu stýrini skulu virka. Hann heldur, at ein nágreinilig lýsing av arbeiðsuppgávunum hjá teimum seks stýrunum er neyðug, áðrenn stjórar verða settir at stýra teimum.

– Verða stjórar settir í uppskotnu stýrini longu nú, er vandi fyri, at teir ganga inn til nakað, teir ikki kenna. Harfatrat fáa teir nærum onga tíð at finna út av, hvussu stýrini skulu arbeiða, tí ráðharraábyrgdin hjá landsstýrismonnunum fær longu gildi á ólavsøku, sigur Jógvan Sundstein.

Útgreinast nærri

Hann skjýtur tí upp, at einir 2-3 persónar við politiskum og umsitingarligum kunnleika verða settir at útgreina allan bygnaðin nærri. Hetta arbeiðið kann væl gerast út frá tí uppskoti, sum Finn Norman Christensen er komin við.

Jógvan Sundstein hugsar sær, at samskipararnir skulu ganga ígjøgnum hvørt stýri sær og fara niður í smálutir við, hvussu tey skulu virka. Arbeiðið hjá samskiparunum skal gerast í samstarvi við tey, sum hava leiðsluna í hvørjum stýri, og í ein ávísan mun saman við starvsfólkunum, heldur Jógvan Sundstein.

– Eg havi varhugan av, at arbeiðið, sum er gjørt, í stóran mun er gjørt uttan um stovns- og deildarleiðararnar, og at starvsfólkini als ikki eru tikin við. Hetta fer at gera tað sera trupult at gjøgnumføra verandi uppskot, og tí má ein nærri útgreining gerast, sigur Jógvan Sundstein.

Stjórar halda fram

Hann er av teirri uppfatan, at landsumsitingin við ráðharrstýri eigur at skipast við útgangsstøði í núverandi deildarbýti í landsstýrinum. Deildirnar kunnu saktans vera seks í tali, sum Norman Christensen hevur skotið upp, og núverandi deildarstjórarnir skulu halda fram – íð hvussu er fyribils.

Stjórarnir í aðalstýrunum ella deildunum skulu ikki setast beinanvegin. Arbeiðið hjá teimum 2-3 samskiparunum, sum skulu útgreina arbeiðsuppgávurnar hjá stýrunum, skal staðfesta, um tørvur veruliga er á at seta nýggjar stjórar.

Vísir tað seg, at tørvur er á nýggjum stjórum, kunnu teir setast so hvørt – yvir eitt ella tvey ár.

– Íð hvussu er má finnast út av, hvussu stýrini ella deildirnar skulu virka, áðrenn stjórar verða settir í tey, sigur Jógvan Sundstein.

Trupul uppgáva

Hann væntar, at teir seks stjórarnir fáa eina trupula uppgávu, um teir verða settir allir í senn. Ikki einans, tí teir ikki vita, hvat teir skulu gera, men eisini tí mótsstøðan ímóti bygnaðinum hjá Finn Norman Christensen tykist at vera stór.

Kritisku viðmerkingarnar frá fleiri stovns- og deildarleiðarum tykjast als ikki at vera tiknar til eftirtektar, og tí sýnast tað, sum at Finn Norman Christensen roynir at trýsta eitt liðugt uppskot niður yvir verandi bygnað, sigur Jógvan Sundstein.

Hetta er óheppið, heldur hann, tí um fólkini, sum skulu virka í nýggja bygnaðinum, ikki vilja spæla við, so fæst hann heldur ikki at virka og dettur bara sundur av sær sjálvum.

Verandi skipan góð

Fyrrverandi løgmaðurin og landsstýrismaðurin heldur, at verandi umsiting er ikki so galin, hóast hon ikki *bara* virkar væl.

– Størsti meinbogin hevur altíð verið, at umsitingin hevur verið ov illa mannað. Tí knípir viðhvørt at fáa hana at virka. Men umsitingin, vit hava í dag, er bygd upp so líðandi eftir tørvi síðan 1948, og tí ber ikki til bara at siga, at hon skal broytast uttan at gera sær greitt, hvussu broytingarnar fara at virka í praksis, sigur Jógvan Sundstein.

Hann heldur, at alt arbeiðið við bygnaðarbroytingunum er latið upp í hendurnar á einum manni, og at føroyskir myndugleikar, tað vil siga landsstýrismenninir og løgmaður, hava gjørt ov lítið við arbeiðið.

Hetta kann bøtast um í sambandi við útgreinandi arbeiðið, sum teir 2-3 samskipararnir skulu gera.

Tá hetta arbeiðið fer í gongd, skulu landsstýrismenninir og løgmaður leggja síni sjónarmið á borðið, so politiski myndugleikin, sum skal virka undir nýggju skipanini, eisini fær nakað at skula hava sagt í sambandi við broytingarnar, sigur Jógvan Sundstein.

Einsamallur maður

Hann undirstrikar, at tað nýtist ikki at vera óheppið, at fremmandur maður er uppii at broyta føroysku umsitingina, tí fólk, sum koma uttanifrá, síggja ofta betur, hvør tørvurin er, enn tey, sum sita mitt í umsitingini.

Men at lata alt upp í hendurnar á Finn Norman Christensen, var óheppið, heldur Jógvan Sundstein, lutvíst tí Norman Christensen hevur fingist við so nógv annað sum forstjóri, meðan hann hevur gjørt broytingarnar, og lutvíst tí hetta hevur forðað fyri, at báðar síður sluppu at siga sítt.

– Ætlaðu broytingarnar í umsitingini kunnu lættliga enda við, at umsitingin ikki fæst at virka, og so stendur ein einsamallur maður eftir sum syndabukkur. Men tá kann tað gera honum tað sama, tí tá er hann farin av landinum aftur, sigur Jógvan Sundstein.

Verður ikki útgreinað betur, hvat tey seks aðalstýrini í bygnaðinum hjá Finn Norman Christensen skulu gera, kunnu bygnaðarbroytingarnar enda við ruðuleika, sigur Jógvan Sundstein.

Tað er ikki forsvarligt at seta stjórar í nøkur stýri, hvørs arbeiðsuppgávur als ikki eru definerað, heldur fyrrverandi løgmaðurin, Jógvan Sundstein, sum skjýtur upp, at arbeiðsbólkur verður settur at útgreina uppskotið hjá Finn Norman Christensen betur.

Starvsmannafelagið: Fólkini í umsitingini eru ongantíð spurd

Starvsfólkini í umsitingini eru ongantíð tikin við upp á ráð í sambandi við ætlaðu bygnaðarbroytingarnar. Hetta hevur havt við sær, at fólk kenna seg ótrygg, nú dagurin nærkast, tá Føroyar fáa ráðharrastýri við broyttari umsiting, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum, Jákup Danielsen.

UNI ARGE

Starvsmannafelagið skipar í kvøld fyri fundi um ætlaðu bygnaðarbroytingarnar hjá landsstýrinum. Ein orsøkin til, at júst Starvsmannafelagið skipar fyri fundi um evnið, er, at bygnaðarbroytingarnar viðkoma í stóran mun limum felagsins.

Starvsmannafelagið sjálvt heldur, at uppskotið hjá Finn Norman Christensen í stóran mun ber brá av at vera ein teoretisk loysn, sum ikki er nóg væl útgreinað.

Hetta hevur felagið gjørt landsstýrið varugt við, og felagið hevur eisini sagt landsstýrinum, at tað heldur forstjóran í Tinganesi vera farnan út um sín málsetning, tá hann hevur tikið allar teir almennu stovnarnar við í broytingarnar og plaserað teir av nýggjum í landsumsitingini.

Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum

Ongin útgreining

Jákup Danielsen sigur, at hetta ber ikki til at gera, fyrr enn viðurskiftini á hvørjum stovni sær eru útgreinað nærri, og funnið er fram til, um trupulleikar eru á stovnunum.

– Í tí tilfari, sum Finn Norman Christensen hevur lagt fram, sigur hann onki um, hvørjir trupulleikar eru orsøk til, at hann plaserar stovnarnar, sum hann ger. Tí áttu hesi viðurskifti at verið kannað nærri, sigur Jákup Danielsen.

Hann heldur tað eisini vera ein trupulleika, at forstjórin í Tinganesi ikki hevur tikið starvsfólkini á ymsu stovnunum við í sítt arbeiði.

– Sum støðan er nú, venda fólk sær ímóti broytingunum, tí tey vita ikki, hvat skal henda. Tey síggja ikki seg sjálvi aftur í øllum hesum, sigur Jákup Danielsen.

Broyta meginfyrisiting

Hann er ikki fyri einhvønn prís ímóti, at broytingar verða framdar. Tvørturímóti er tað umráðandi at fáa eina sterka landsstýrisumsiting á føtur, har greitt verður definerað, hvørjar heimildirnar hjá stjórunum skulu vera.

– Landsstýrisumsitingin varð umskipað í 1987. Tá skuldi ein forstjóri setast, men hann kom ongantíð, og tí fór samskipanin av lagi, og starvsfólk og deildarleiðarar vórðu slept upp á fjall, sigur Jákup Danielsen.

Tí er mest átrokandi málið í dag at fáa hesi viðurskifti upp á pláss fyrst, áðrenn hvør einasti stovnur verður drigin upp í arbeiðið, heldur hann.

Fjølnir leggur upp í oljukjakið

Blaðið hjá teimum lesandi uttanlands er komið út fyri fjórðu ferð í ár. Hesaferð er evnið føroyingar og olja, og í tí sambandi er forsíðan mest at kalla kolasvørt.

UNI ARGE

Í Fjølni eru heili fýra greinir um olju hesaferð.

Suni á Dalbø setir í síni grein spurningin, um føroyingar og oljan eru eitt hóskandi par. Friðbjørg Biskupstø skrivar, at alsamt fleiri føroyingar eru farnir at lesa jarðfrøði, helst tí at vónirnar um eina komandi oljuvinnu í Føroyum eru stórar. Erling Isholm skrivar umfatandi grein um olju og útbúgvingarpolitikk. Og Kim Simonsen hevur grein um føroyingin Poul Kára Simonsen, sum starvast í donsku oljuvinnuni.

Fjølnir hevur sostatt rættiliga sett spakan í fyri at finna út av, hvørjir møguleikar standa ungum føroyingum í boði, nú alt bendir á, at dýrir dropar eru í undirgrundini.

Annað tilfar

Men blaðið hevur eisini annað tilfar hesaferð.

Ronnie Thomassen spyr í drúgvum innleggi, um Meginfelag Føroyskra Studenta kann brúkast til nakað sum helst. Ferðafrásagnir eru eisini úr Oslo og frá dansiferð í Danmark, og ein frásøgn er um kjakfundin í Føroyahúsinum í Keypmannahavn um føroyskan útbúgvingarpolitikk, sum var herfyri.

Umframt hesar greinir eru eisini hugleiðingar, ummæli, samrøður og onkur yrking í blaðnum, sum hesaferð er 36 síður.